BLAÐIÐ
– sum øll tosa um –






JA! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.
fyri 225 kr./ársfj. (haldarar í Føroyum)
fyri 335 kr./ársfj. (haldarar í Skandinaviu)

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum.

Navn: ........................................

Bústaður: ........................................

Bygd/býur: ........................................

Land: ........................................

Tlf.: ........................................

Kannað postverkinum

Ókeypis
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Tíðindablaðið
SOSIALURIN
Postboks 76,
FR-110 Tórshavn

# Úr Bahrain til Føroya á oljuráðstevnu

*Landsstýrið skipar í næstum fyri eini størri oljuráðstevnu í Havn. Millum fyrilestrahaldararnar er Sverre Dan Joensen, sum nú í skjótt eitt ár hevur verið fastur oljuskribentur hjá Tíðindablaðnum Sosialinum.*



*Marita Petersen, løgmaður fer at seta oljuráðstevnuna*



*Sverre Dan Joensen, sum nú í skjótt eitt ár hevur verið fastur orku- og oljuskribentur hjá Tíðindablaðnum Sosialinum er boðin við til oljuráðstevnuna*

Nú verður so skipað fyri eini oljuráðstevnu í Havn við fyrilestrum og orðaskifti. Tað er landsstýrið, sum skipar fyri hesi stevnu. Marita Petersen løgmaður, sum eisini er ráðharri í undirgrundarmálum sigur við Sosialin, at tá løgaruppskot um komandi oljukanningar vóru til viðgerðar á tingi herfyri vóru tað fleiri tingmenn, sum settu fram ynski um, at landsstýrið skipaði fyri eini stevnu, soleiðis at teir kundu fáa eitt betri innlit í allan oljuspurningin.

-Vit hava tikið hesi áheitan til eftirtektar og vóna, at vit fáa eitt gott upplýsandi skeið og orðaskifti sigur løgmaður, sum skal seta ráðstevnuna. Millum gestirnar er m.a. Sverre Dan Joensen, hálvur føroyingur, sum er búsitandi í oljulandinum Bahrain. Tað er sami maður, sum nú í skjótt eitt ár hevur verið fastur orku- og oljuskribentur hjá Tíðindablaðnum Sosialinum.

Landsstýrið skipar í døgunum 12. og 13. nov. fyri ráðstevnu um undirgrundarspurningin.

Ráðstevnan er ætlað politikarum, men umboð fyri feløg og stovnar fáa eisini høvi at luttaka.

Ráðstevnan er skipað sum fyrilestrar, ið leggja upp til spurningar. Endað verður við orðaskifti um, hvørjir møguleikar eru fyri føroyingum í oljuvinnuni.

Marita Petersen, løgmaður, fer at seta ráðstevnuna og síðan er ein røð av fyrilestrum. Fyrra dagin verða fyrst olja og gass sum liður í orkuveitingini – og oljuídnaður sum vinnugrein – á altjóða og heimligum støði lýst, síðan verður tað føroyska økið viðgjørt. Greitt verður frá landgrunsøkinum og fiskiøkinum, tí »hvíta« økinum, tí »gráa« økinum, og hvørjar kanningar kunnu gerast hvar. Tey jarðfrøðiligu viðurskiftini og fortreytirnar fyri at olja finst, tey ymisku skeiðini í eini oljuverkætlan og møguligt árin á umhvørvið verða viðgjørd.

Seinna dagin verður greitt frá, hvussu oljuídnaðurin virkar Bahrain verður viðgjørt, um dømi um eitt lítið land við oljuídnaði. Síðan verður tørvurin á løgum, reglugerðum og umsitingarviðgerðum og síðsti fyrilesturin er um gongdina í norsku oljuumsitingini, har komið verður við fyrimunir og vansar við almennari stýring og hvat er neyðugt at stýra.

Endað verður við orðaskifti um hvørjir møguleikar eru fyri føroyingum í oljuvinnuni, har umboð frá vinnulívinum hava stutt innlegg.

Fyrilestrarhaldarar koma ymsastaðni frá. Umframt limirnar úr Oljuráðleggingarnevndini kunnu nevnast stjórin á norska Oljudirektoratinum, umboð frá danska Orkuráðnum (Energistyrelsen), umboð frá Fiskirannsóknarstovuni og Sverre Dan Joensen úr Bahrain.

Ráðstevnan verður hildin í Læraraskúlahøllini.

Tey umboð fyri feløg og stovnar, ið ætla at luttaka, skulu melda frá luttøku á tlf. 12306 í seinasta lagi 8. nov. Avmarkað luttakaratal.